

# Brandbilar í Lítluvík

MENTANARNÁTTIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Mentanarnáttina verður ein forvitnislig framsýning í smiðjuni í Lítluvík. Talan er um Tórshavnar sløkkilið, ið fer at sýna fram ymisk tól og myndir úr gomlum døgum, eins og nýggjar brandbilar og sløkkiútgerð.

– Fyrr í vikuni vendi kunningarstovan í Havn sær til Tórshavnar sløkkilið, og spurdi um áhugi ikki var fyri, at hava eina framsýning í smiðjuni í Lítluvík. Tey fingu játtandi svar, og í nú rokast tey so við fyrireikingarnar.

– Inni í smiðjuni sjálvari verður í øllum førum ein framsýning við gomlum myndum, vatnpumpum og aðrari gamlari sløkkiútgerð. Uttanfyri ætla vit so at hava onkrar brandbilar og stigabilin. Eisini hevur talan verið um at bjóða fólki til at royna ymiska sløkkiútgerð á parkeringsplássinum á Skálatrøð, verður sagt av Brandstøðini í Havn.

Umframt sjálva framsýningina er, sum skilst, ætlanin at hava okkurt fyri allar aldursbólkar, soleiðis, at børnini sleppa at sita í brandbilunum og sleppa at royna stigan, meðan tey vaksnu kunnu royna seg sum eldbasarar undir eftirliti av brandfólki.

– Men uttanduratiltøkini eru sjálvsagt stýrd av veðr-in-um, verður sagt.

Ætlanin er, at hava framsýningina bæði fríggja- og leygardagin. Bilarnir koma tó neyvan at vera har allatíðina, veðrur sagt.

Enn er alt tó ikki komið heilt uppá pláss, og lýst verður nærri um tiltakið seinni.

# Vertshúsið umvælt og broytt innan

**Í seinastuni hava handverkarar havt sína dagligu gongd inn á Vertshúsið í Niels Finsensgøtu. Og tað í arbeiðsørindum. Munandi broytingar eru nevniliga framdar inni í Vertshúsinum**

MENTANARNÁTTIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Talan er um nakrar kundavinaligar broytingar, sigur Annika Thomsen, sum er dagligur leiðari niðri á Vertshúsinum.

– Vit hava arbeitt í eina knappa viku, hava tikið onkrar veggir niður og málað við ljósum litum. So nú skuldi verið ljósari og luftigari at sitið her niðri, sigur hon. – Eisini hava vit bílagt nýggjar møblar, m.a. størri borð, so tað verður rúmligari hjá fólki at sita og t.d. spæla kort.



*Í eina knappa viku hava handverkarar arbeitt inni í Vertshúsinum. Høvi verður at síggja broytingarnar, tá Vertshúsið letur upp aftur 4. juni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sum skilst hava tey á Vertshúsinum fingið nógvar áheitanir um at sleppa sær av við myrku litirnar, ið hava verið á veggjunum. Fólk orka rætt og slætt ikki at sita inni har, tá tað er so myrkt. Tað hava tey tikið til eftirtektar og tað verður so broytt nú.

– Eisini hava vit havt eitt keðiligt umdømi á okkum, um at vit hava havt ein heldur keðiligan kundaskara, men nú verður alvorliga strammað upp á tí økinum. Vit vænta eisini, at nýggju ljósu litirnir fara at bøta um hetta, sigur Annika.

– Ætlanin er, at fólk skulu kunna koma inn á gólvið og fáa sær eitthvørt svalandi ella ein kaffimunn at drekka, uttan at verða órógvað, sigur hon.

Sermerkti stílurin, sum Tróndur Paturson stóð fyri tá Vertshúsið læt upp, verður tó ikki heilt burturbeindur. Glasmálningarnir, lampurnar og barrin verða tað sama. Tað eru bert dimmblái og reyði liturin, ið verða skiftir út við ljósari litir.

– Vit lata upp aftur fríggjadagin 4. juni, tá mentanarnáttin er. Í hesum sambandi verða kabarettsangir framførdir, og vit ætla at hava opið í kjallaranum eisini, sigur Annika at enda.




# Tónleikur og vaflur í Grasagarði



*Grasagarður verður karmurin um tónleikatiltakið, sum Musikkskúlin skipar fyri mentanarnáttina*

*Savnsmynd*

**Mentanarnáttina verður stórt tónleikatiltak í Grasagarði, sum musikkskúlin skipar fyri. Tiltakið byrjar kl 15.30 og heldur á heilt inntil kl 22. M.a. verður fyri fyrstu ferð høvi hjá almenninginum at hoyra yngsta stórband í Føroyum. Hetta eru ungir tónleikarar í aldrinum 10-15 ár**

MENTANARNÁTTIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

At áhugin fyri tónleiki er stórur ímillum tey ungu, er einki at dylja. Og at vit eiga nógvar evnaríkar, ungar tónleikarar skerst heldur ikki burtur. Tónleika tiltøkini fyri tey ungu eru mong, og fríggjadagin 04.juni verður so aftur møguleiki hjá øllum at hoyra hvat tónleikaungdómurin í Havnini dugir. Tá fer Tórshavnar Musikkskúli nevniliga at hava konsert allan dagin í Grasagarði. Tiltakið byrjar kl 15.30 og tað heldur á líka til kl 22.

Millum tey luttakandi verður m.a. Føroya yngsta Big Band, sum spælir lívligan swing tónleik. Aldurin á teimum í orkestrinum er ímillum 10-15 ár, og tey hava aldri framført fyri almenninginum áður.

Hesir ungu, men málrættaðu tónleikararnri ætla sær til Íslands at spæla komandi ár, og í sambandi við hesa ferðina, fara foreldur at selja kaffi og sodavatn, meðan tónleikatiltakið verður á skránni. Eisini fara tey at baka vaflur í Grasagarði, so møguleiki verður at fáa sær eina nýbakaða vaflu afturvið góða swingtónleikinum fríggjakvøldið.







*Millum nøvnini, sum verða við á útikonsertini leygarnáttina, verða m.a. Headache Blues Treo og Lena og Niclas*

# Stór útikonsert á Vaglinum

**Í sambandi við Mentanarnáttina, skipar Mentón fyri stórari konsert niðri á Vaglinum. Talan er um so mætar bólkar sum Lenu og Niclas, Headache Blues Treo, Týr, Høgna Lisberg Band og Zink, sum fara á pall. Og tiltakið verður púra ókeypis fyri áhoyraran**

MENTANARNÁTTIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Tey, ið búgva í miðbýarøkinum í Havnini, skulu ikki vænta sær nógvan svøvn náttina til leygardagin. Í miðbýnum verður nevniliga ein stór útikonsert, við nøkrum av landsins bestu rock og poppbólkum. Flest allir bólkarnir eru í hesum døgum fløguaktuellir, og tískil verður hetta somuleiðis ein góður møguleiki at hoyra, hvat rørir seg innan føroyska tónleikaheimin júst nú.

Heðin Ziska Davidsen, formaður í Mentón, heldur ikki, at ein tílík konsert hevur verið hildin áður í Føroyum.

– Tað, sum líkist mest eru nokk Free Føroyar konsertirnar, sum vórðu hildnar á sinni. Og hendan konsertin verður eisini skipað sum Free Føroyar konsertirnar vórðu skipaðar tá.

– Vit hava fingið ein stóran bil frá Føroya Bjór, sum vit fara at nýta til pall. Hjalmar Hvítklett hevur stuðlað okkum við at læna okkum eitt anlegg, og annars hava bæði Føroya Banki og Kunningarstovan stuðlað okkum. Einki gjald verður tikið fyri konsertina, so tað skulu góðir stuðlar til, fyri at fáa tiltakið at mala runt, sigur hann.

Hann sigur, at tað eisini er eftir vælvild frá bólkunum, at hetta tiltakið letur seg gera.

– Hetta er ikki eitt tiltak, sum ger tónleikararnar ríkar, tí tann fíggjarligi stuðulin, vit hava fingið, fer til onnur ting enn lønir. So tónleikararnir eiga heilt víst stóra æru av, at hetta verður til nakað, sigur hann.

Víðari sigur Heðin, at tað ikki er løgd nøkur strømm tímatalva fyri konsertina.

– Vit hava ætlað umleið ein hálvan tíma til hvønn bólk, so konsertin skuldi verið í góðar tveir tímar, men so leingi fólk tíma at lurta, halda vit á. Vit fara ikki at ganga strangt eftir klokkuni, sigur Heðin.

Konsertin byrjar kl 23 fríggjakvøldið, og heldur sum sagt fram í umleið hálvan triðja tíma, ella so leingi áhugi er millum áhoyrararnar.

## Summarframsýningin 2004

MENTANARNÁTTIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Árliga summarframsýningin letur upp í Norðurlandahúsinum mentanarnáttina 04. juni kl 22. Við á framsýningini verða átta føroysk listafólk.

Aftur í ár fer Norðurlandahúsið at skipa fyri summarframsýning. Talan er um eina ógvuliga fjølbroytta framsýning, við átta føroyskum listafólkum. Verkini verða m.a. av fotografi, textil, kt, skulpturum og video, og áhugað kunnu vænta sær eina fjølbroytta uppliving.

Framsýningin verður í dansistovnui, klingruni og í forhøllini, og hon veðrur opin til og við Ólavsøkudag.

Av listafólkunum kunnu nevnast Anker Mortensen, Svanhild Strøm, Martin Nolsøe og Annie Heinesen.

Framsýningin letur upp mentanarnáttina kl 22.

